# Skiparin er lógarfestur diktator

*- Hóast tíðirnar eru broyttar, og leiðsluhættirnir vorðnir meira modernaðir, so er rætturin og autoriteturin hjá skiparanum lítið broyttur. Skiparastarvið ber við sær hitt einasta lógbefalaða diktaturið í siviliseraða heiminum, segði Tórbjørn Jacobsen, tá hann helt røðu á Sjómansskúlanum í Havn hósdagin*



*– Kanska ber tað í grundini ikki til at læra nakað sum helst, men bara at styrkja um tey evni, sum tú frammanundan hevur fingið í vøggugávur, segði Tórbjørn Jacobsen í røðu síni til sjómansskúlanæmingarnar. Mynd: Jens Kristian Vang*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tá ið sjómansskúlanæmingarnir í Havn fingu prógvini handað hósmorgunin í síðstu viku, helt ein av fyrrverandi næmingunum á skúlanum, Tórbjørn Jacobsen av Glyvrum, røðu fyri næmingunum.

Hann hugleiddi um sína egnu skúlatíð, sambandið millum ástøði og praksis og um einasta lóggivna diktaturið í tí siviliseraða heiminum.

Tórbjørn víst á, at í sjómanslógini stendur, at „skiparin kann taka tað til at ráða, sum neyðugt er, til at halda skil umborð á skipinum".

- Eg plagi at arga maskinmenninar við hesum og greiða teimum frá, at hetta er ein frumrættur, sum er íkomin av tí, at navigatørarnir hava verið til síðani jarðarinnar fyrsta vindblak, meðan maskinmenninir hava lítið meira enn hundrað ár á baki í søgunnar ljósi.

- Men vit kunnu í hvussu so er staðfesta, at skiparastarvið ber við sær hitt einasta lógbefalaða diktaturið í siviliseraða heiminum. Og tað er ikki so lítið at hava rættin til og ábyrgdina av, segði Tórsbjøn Jacobsen við sjómansskúlanæmingarnar.

### Teori og praksis

Skiparin, sum eisini er kendur sum politikari, tosaði eisini um sambandið millum ástøði og praksis.

Hann greiddi frá, at cubanski diktatorurin, Fidel Castro, hevði sagt, at hann hevði gingið í tveimum skúlum í lívinum. Á lærda háskúlanum í Havnna lærdi hann einki, men í hinum skúlanum - lívsins skúla - lærdi hann alt, sum hann nú einaferð dugdi.

- Og líkamikið hvat vit meina um hendan mannin, so eru orðini beinrakin. Tað fáa tit at síggja. Í dagliga stríði tykkara koma tit at ásanna hesa credo.

- Sjálvandi kemur ástøðiligi kunnleikin hiðani úr Nóatúni at liggja sum ein latent vitanarbasa í tykkara framhaldandi foldarlívi, men í praksis verður tað sum við ísfjallinum; tað er bara ein tíggjundapartur undan vantskorpuni á gangin. Tað sum síðani skal til harafturat, mugu tit sjálvir tiltuska tykkum, segði Tórbjørn Jacobsen.

### Ber ikki til at gera leiðarar

Í tráð við hetta segði Tórbjørn eina søgu frá síni egnu skúlatíð, har eitt leiðaraskeið varð uppfunnið. Hetta gekk fyri seg eftir skúlatíð.

- Undirvísingarligi úrmælingurin, Ólavur á Heygum, stjórnaði hesum skeiði, men hugurin var lítil hjá næmingunum. Einu ferðina sovnaði Hanus Hansen úr Klaksvík, og tá snorkingin var komin upp í ekstremar hæddar, fór Ólavur á dyr í øðini. Hann staðfesti turt, at Hanus ongantíð kom at gerast leiðari fyri nøkrum sum helst, greiddi Tórbjørn frá.

- Hanus hevur síðani verið rokskipari í eini 10 ár, og hann er nú stjóri í størstu fyritøkuni í landinum. Tú kanst ikki gera leiðarar. Tað er sum við grønlendska sleðuhundinum, teir velja seg sjálvar út viðsínum náttúrliga førningi.

- Ja, kanska ber tað í grundini ikki til at læra nakað sum helst, men bara at styrkja um tey evni, sum tú frammanundan hevur fingið í vøggugávur, segði Tórbjørn Jacobsen í røðu síni til sjómansskúlanæmingarnar.




# Matiné í Havnar kirkju

*Leygardagin 1. juli kl. 11.30 verður matiné, fyrrapartstónleikur í Havnar kirkju við sangi og orgulspæli*

Tveir gávuríkir føroyingar Elsa Súsanna Dalsgaard, sangur og Helgi Breiner Petersen, orgul, sum búleikast uttanlanda, hava setty eina stóra og krevjandi skrá saman. Longu seinasta mánakvøld framførdu tey hana fyrru ferð í Glyvra kirkju á sera sannførandi hátt.

Her vóru bæði nýggir og gamlir tónar at hoyra. Flestu verkini hava ongantíð verið framførd í Føroyum áður, og tað í sær sjálvum er altíð forkunnugt.

Ib Nørholm, Peter Møller og Leif Kayser eru tónaskøld úr Danmark, sum langtsíðani eru vorðin klassikarar og ikki kann sigast annað enn, at tað var ein frægd at hoyra nýggja orglið á Glyvrum so vakurt klingandi saman við tí fultónandi røddini á Elsu Súsannu. Elsa Súsanna er nú á veg til operuna í Oslo, har hon hevur fingið fast starv í august, og fylgja henni nógv góðynski á pallin har.

Helgi Breiner Petersen er hóast unga aldur sín ein seriøsur og kensluborin tónleikari, sum dagliga starvast á Frederiksbergs slotskirkju, meðan hann ger seg lidnan á konservatoriinum.

Framførslan var á internationalum støði, og øll sum hava áhuga fyri kirkjutónleiki, hava nú høvi til at hoyra verkini framførd leygardagin í Havnar kirkju kl. 11.30.





## Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Súkkling á Jóansøku í Vági

*Føroya fremsti súkklari var komin heim til Vágs á jóansøku, og tað eydnaðist honum eisini at vinna triðja umfarið í Grand-Prix súkklukappingini. Tá hann sunnudagin sat í flúgvaranum á veg til Danmarkar, skrivaði hann nøkur orð um súkklingina, og verða tey prentaði niðanfyri*



*Sum væntað, so var tað serliga Gunnar Dahl-Olsen, sum royndist drúgvur hjá Rógva at basa*

***Mynd: Áki Bertholdsen***

Við hjálp frá skálanum við Skálá í Vági, eydnaðist tað mær at koma heim til súkklukappingina „Grandprix Føroya" sum var á Jóansøku.

Ikki kan ein sammeta kappingina við eina súkklukapping í Danmark. Feltið her heima, er ikki so stórt og óivað heldur ikki so sterkt, men kappingin er kortini ikki heilt so einføld at vinna, tí vit hava nakrar súkklarar, sum eru rættuliga góðir.

Til kappingina á Jóansøku, hevði eg gjørt mínar tankar um hvussu leikur fór at fara fram.

### Mótstøðan

Gunnar Dahl-Olsen hevur verði einaráðandi í øllum Grand Prix kappingum, sum higartil hava verið. Hann hevur vunnið tær allar og nakrar av teimum sannførandi, og tí væntaði eg, at hann eisini á Jóansøku skuldi verða tann, sum fór at geva mær størstu mótstøðuna.

Eisini roknaði eg við mótstøðu frá unga vágbinginum og bygdarmanni mínum, Kára Brattaberg. Hann hevur annars tað heldur keðiligu støðu, sum eg sjálvur hevði, tá eg búði har suðuri, nevniliga at venja einsamallur, tí har er rætt og slætt eingin annar súkklari.

Kári var eitt gott boð uppá eina góða kapping, og hann koyrdi eisini gott ein stóran part av kappingini, men seinni vísti tað seg, at hann skuldi verða óheppin hendan dagin. Hann hann fekk trupulleikar við kervinum og megnaði tí ikki at fylgja við feltinum upp um sera brøttu Krosslábrekkuna.

Eisini roknaði eg við Johan Brend, sum vanliga koyrur fyri felagið CC. Gladsaxe í Danmark. Hetta felag húsast á Sælandi, og er talan um sama felag, sum Bogi Kristiansen og Egil Rasmussen koyrdu fyri, tá teir súkklaðu.

Johan koyrur í C. bólkinum, og tað hevur gingið hampuliga væl hjá honum, og hevur hann eisini vunnið sær nøkur stig í bólkinum. Johan hevur eisini tikið seg nógv fram sum súkklari. Hansara sterka síða, hevur vanliga verið einkultstartirnir, men eftur at hann hevur koyrt eitt hálvt kappingarár í danmark, hevur hann ment seg enn meira, til teir samlaðu startinir.

Sverri Mohr Edvinsson varð mettur sum »jokarin« í hesari kapping, og eg visti ikki rættuliga hvussu hann var koyrandi. Hann var rættuliga væl koyrandi á Oyggjaleikunum á Gotlandi í fjør summar, men hann er ikki besti vinur við ov brattar brekkur, og tað má man siga at Krosslábrekkan var, tí tað skuldi vísa seg, at tað var ikki júst hansara dreymateinur, sum vit koyrdu hendan dagin.

### Trupulleikar av ferðsluni

Veðrið var gott í Vági hendan jóansøkudag. Smyril var seinkaður eitt sindur, so kappingin var útsett umleið ein hálvum tíma.

Nógv fólk var komið saman fyri at síggja hesa kapping, heilt fitt av fólkið stóð niðan eftur Krosslábrekkuni. Har er gott at standa, tí ferðin er ikki so nógv niðan eftur tí brøttu brekkuni, og tað er sum oftast har, at kappingin verður avgjørd.

Eitt sum eg haldi verða stuttligt, er at fólk eru byrjað at skriva nøvnini á teimum súkklarum, sum tey halda við, niður á vegin. Hetta er ein háttur, sum verður nógv brúktir uttanlands, og eg beit merkið í at navni á Johan Brend var skriva ovast í brekkuni.

Sjálvt um løgreglan var til staðar, fyri at hava tamarhald á ferðsluni, vóru eitt sindur av trupulleikum av bilum á teininum, men av tí at feltið ikki var so stórt, var trupulleikin ikki til so stóran ampa, at kappingin bleiv tarnað alt ov nógv.

### Kappingin

Kappingin byrjaði við at vit koyrdu trý umfør við róligari ferð. Eftir hetta var kappingin opin og tað bleiv koyrt í 50. min + ein umgang.

Eg var greiður yvir, at tað bleiv hildið eitt vakið eyga við mær og hvat eg fór at gera. Mín uppgáva var tí heilt greið. Eg var noyddur at sleppa av við Gunnar, Johan, Kára og Sverra, ti tað vóru hesir fýra, sum vístu seg at verða best koyrandi í feltinum.

Eftir at Krosslábrekkan var koyrd nakrar ferðir, varð Sverri tann fyrsti sum var noyddur at sleppa hjólunum hjá førara feltinum, so nú vóru Gunnar, Johan, Kári og eg eftir í hesum bólkium. Tað sá út til at vit fýra koyrdu brekkuna javnt gott, og so var spurningurin, um allir kundi halda til at koyra hana uml. 25 ferðir við góðari ferð.

Kári fekk trupuleikar við kervinum og var tí settur í brekkuni. Spell, tí hann sá út til at koyra væl. Kári hevur vant hendan teinin rættuliga nógv, fyri at vísa bygdarfólki sínum eitt gott úrslit, nú koyrast skuldi á heimavølli.

Nú vóru Gunnar, Johan og eg eftur í førara feltinum. Eg gjørdi onkra royndina at sleppa undan teimum, men teir arbeiddu væl saman og megnaðu hvørja ferð at koma upp aftur til mín.

Avgerandi varð helst, hvør megnaði at halda tørn í brekkuni. Tað sá út til, at Johan byrjaði at hava trupulleikar í brekkni, men hann megnaði fleiri ferðir at koyra seg upp aftur til feltið, men tá ein súkklari byrjar at (sum danir siga) koyra sum ein elevator, er sum oftast bert ein spurningur um tíð, til hann ikki orkar meira. tá uml. 15. min vóru eftir, vóru kreftinar hjá Johan brúktar upp, og hann varð noyddur at sleppa hjólinum hjá Gunnari og mær.

Nú var so Gunnar eftir, Gunnar koyrdi brekkuna sera væl, men eg var greiðir yvir at skuldi eg vinna kappingina, so skuldi hann setast í brekkuni.

Gunnar er sera spurtsterkur og eg helt tað tí ikki vera nakað gott at hugskot at enda kappingina við einum endaspurdi móti honum. Tí royndi eg at koyra hann troyttan í brekkuni og eftur einar tvær tríggjar ferðir at hava koyrt brekkuna við nógvari ferð og har eftir at seta ferðina enn meira upp, tá vit vóru komnir upp á slætt, eydnaðist tað mær at sleppa burtur frá Gunnari, men tað var ikki lætt.

Eg var ógvuliga glaður um hendan sigur, tí hetta var á ein hátt mín máti at siga Skálanum við Skálá í Vági takk, fyri at tey voru sinnað at stuðla mær, soleiðis at eg kundi koma heim til hesa kapping.

### Øktur áhugi

Einasti kvinnuligi føroyski súkklarin Ann Zachariasen var eisini við í kappingini. Stuttligt er at síggja, at áhugin fyri súkkling, eisini er millum kvinnur og vónin er, at fleiri kvinnur farar at súkkla, soleiðis at Ann fær onkra at kappast við.

Í Danmark eru nógvar kvinnur sum súkkla. Tað eru tveir bólkar, dame A og dame B, og harumfdramt eru tvey elite súkklulið hjá kvinnum. Tey eru Team Bornholm og Team Lolland- Falster. Tað er eisini eitt kvinnulandslið og nakrar av teimum sum eru á tí, súkkla sum proffar uttanlands.

So um kvinnunar taka seg saman, er ikki óhugsandi at vit eisini kunnu hava eitt kvinnulandslið, sum kan luttaka á komandi Oyggjaleikunumð

Eisini eru nakrir ungir súkklarar byrjaðir at súkkla, tað eru hesir, sum vit skulu byggja okkara álit á. Ásannast má, at elitan í føroyskari súkkling hevur ein høgan miðalaldur, so um vit ikki røkja okkara yngru súkklarar væl, kan vantast at føroysk súkkling má byrja av nýggjum og tað vil verða eitt tungt stig at taka.

Nú stundar til stóru „kring Føroyar" kappingina. Hon byrjar tann 19. juli í Klaksvík og endar tann 23. juli í Havn.

Eg havi við mínari luttøku á Jóansøku, avdúkað mítt støði, men tað eru enn stundir hjá súkklarnum heima í Føroyum at menna sítt venjingarstøgið. Tað er óivað eisini tað, sum teir fara at gera hesar komandi vikunar fram til stóru etapu kappingina, har vit skullu súkkla kring Føroyar.



*Tað er at fegnast um, at føroyskar kvinnur nú eisini eru farnar undir kappsúkkling*